

Arndis Andreasen rør við Sílinum, og situr lærinum í stýriborð:

## Rættilig uppreisn

-Jú hetta var ein ordilig uppreisn frá seinastu róðri, og tað er fantastiskt, at tað hevur eydnast okkum at gerast føroyameistarar, áðrenn seinasta róðurin á ólavsøku, sigur bátsformaðurin umborð á Sílinum, Arndis Andreasen.

Kvinnumanningin hjá Sílinum hevur verið rættiliga sannførandi í ár, og leygardagin eydnaðist tað kvinnumanningini hjá Havnar Róðrarfelag at gerast føroyameistarar. Sílið hevur vunnið allar róðrarnar í ár uttan róðurin á Fjarðastevnu fyri góðari viku síðan.

- Eftir annað plássið á Fjarðastevnu, vóru vit rættiliga uppsettar at vinna í dag, og alt riggaði hjá okkum í dag, sigur ein ovurfegin Arndis Andreasen.

Hon hevur róð við Sílinum seinastu fýra árini, og hetta er á fyrsta sinni at henni eydnast at gerast føroyameistari. Seinastu tvey árini hevur Sílið mist føroyameistaraheitið á ólavsøku.

*Hvør er munurin á manningini í ár sammett við undanfarin ár?*

-Tú kanst siga, at vit hava lært av mistøkunum hini árini, og vit vita nú, hvat veruliga krevst fyri at gerast føroyameistari. Í ár hava vit eisini vant harðari enn undanfarin ár, og hetta lønar seg aftur í dag, sigur Arndis Andreasen.

**.páll**



*Kvinnurnar á Sílinum fingu uppreisn á vestanstevnu. Tær vunnu róðurin eftir at Fípan Fagra hevði steðgað sigursrøðini hjá teimum leygardagin frammanundan, og tær gjørdust eisini føroyameistarar*

*Mynd: Álvur*

# Sílið staðfesti støðuna

**Hóast snýttar frá sigrinum á fjarðastevnu, so lótu kvinnurnar á Sílinum ongan iva vera um, at tað ikki er av ongum, at tær eiga oddasessin og nú eru føroyameistarar hjá fimmmannaførum við kvinnum**

FIMMMANNAFØR KVINNUR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sílið úr Havn skrivaði kappróðrarsøgu leygardagin. Sum tann fyrsta kvinnumanningin, ið vinnur føroyameistaraheitið við fimmmannaførunum. Hetta er tað fyrsta árið, at bæði gentur og kvinnur rógva við fimmmannaførunum.

Ikki kann annað sigast enn, at Sílið veruliga fekk uppreisn í Miðvági leygardagin. Tvær ferðir hava fleiri av manningini verið við til at tapt føroyameistaraheitið í seinasta róðrinum. Á Ólavsøku í fjør endaði Sílið á einum fimta plássið, meðan Blikur vann róðurin og harvið føroyameistaraheitið. Tann støðan endurtekur seg ikki í ár, tí Sílið hevur vunnið allar róðrarnar uttan fjarðastevnu og eru føroyameistarar.

Stórt trýst hevur óivað verið á Sílakvinnunum undan róðrinum leygardagin, men tær sýntu væl og virðiliga, at tær eru rætta manningin, sum fer at standa við gullkrónunum Ólavsøkuaftan.

Sílið fekk annars kapping frá fleiri øðrum bátum, men megnaði at halda tørn allan vegin og vinna róðurin. Fípan Fagra, sum vann undanfarna róðurin, fekk annaðplássið, men tað var sera tætt millum Fípuna og Frúnna. Hvussu verður á Ólavsøku er ikki gott at vita nú, men óivað verða Sílakvinnurnar sera uppsettar at vinna Ólavsøkuróðurin á heimasjógvi.

### 5 mannafør kvinnur

1 Sílið 05:13.20
2 Fípan Fagra 05:17.04
3 Frúgvin 05:17.05
4 Royndin Fríða 05:20.19
5 Blikur 05:21.22
6 Ørnin 05:27.12 1G
7 Firvaldur 05:28.08
8 Junkarin 05:28.15
9 Ritan 05:30.01
10 Falkur 05:45.21







*Sílið var langt framman fyri Fípuna Føgru og Frúnna, sum komu nærum samstundis á mál sum ávíkavist nummar tvey og trý*

*Mynd: Álvur*